TVØROYRAR KOMMUNA

# Pedagogar til Dagstovnin Mýrifípuni og Sóljuna í Trongisvági

Vit søkja eftir einum pedagogi í fast starv í Sóljuni (Útibarnagarðurin), 30 tímar um vikuna frá 02.08.2010

Tveimum pedagogum sum barnsburðaravloysarar, 30 tímar um vikuna, annað starvið á Reyðu stovu frá 02.08.2010 til 30.06.2011 og hitt á Vøggustovuni frá 02.08.2010 til 31.10.2011

Fá meira at vita um størvini og umsóknarfreist við at fara inn á heimasíðuna hjá Tvøroyrar Kommunu www.tvoroyri.fo

**Dagstovnurin Mýrifípan**
Smærugøta 8 · 826 Trongisvágur · Tlf. 37 27 00

# FRÍTÍÐARHEIMIÐ Í SKRIVARAGØTU

Frítíðarheimið í Skrivaragøtu søkir eftir pedagogi 40 tímar um vikuna frá 1. august 2010 ella eftir nærri avtalu.

Frítíðarheimið er samdøgursstovnur, har børn, ung, vaksin og eldri við menningartarni koma til umlætting í styttri ella longri tíðarskeið. Pláss er fyri 5 fólkum í senn. Starvið er farloyvisstarv í eitt ár.

Skrivlig umsókn við prógvum og arbeiðsváttanum skal sendast til:

Stýrið fyri Frítíðarheimið
Skrivaragøtu 5
100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 30. juni 2010 kl. 12.00.

**Les alla lýsingina á heimasíðu okkara: www.naerverk.fo/leys størv ella á pedagog@pedagogfelag.fo**

Skrivaragøtu 5 · FO-100 Tórshavn
Telefon: 313353 · Telefaks: 319839
Teldupostur: friskriv@serforsorg.fo

Hvalbiar 1973 skúli
850 Hvalba
tlf. 375083

# Lærarastørv í Hvalbiar skúla

**Hesi størv verða lýst leys:**
- 1 starv uml. fulla tíð fyri lærara í barnsburðarfarloyvi frá 16. august 2010 til 31. mars 2011
- 1 starv uml 12 tímar vegna avlopstíð skúlaárið 2010/2011
  Endaliga tímatalið av hesum seinasta starvi verður ásett eftir 1. september 2010

**Tímatalvan til barnsburðarfarloyvi fatar um:**
- Føroysk í 4. fl
- Donsk í 4. fl
- Kristni í 4. fl
- Serundirvísing
- Flokslærari í 4. flokki

**Tímatalvan til starvið vegna avlopstíð fatar um:**
- Søgu, landalæru og enskt í framhaldsdeildini

**Tey, ið sett verða skulu:**
- undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiðinum á skúlanum
- hava vilja til at samstarva og hava áhuga í toymissamstarvi
- vera fakliga væl fyri og professionell
- vera engageraði og fús at taka á seg tær uppgávur, ið eru á skúlanum
- vera fyrikomandi
- starvast fyri góðum samstarvi millum heim og skúla
- í samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vera áhugað í at menna skúlan

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving frá góðkendum læraraskúla og viðkomandi linjulestur.

**Lønar og setanartreytir:**
Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum frá 18.1 – 29.2 og verða sett sum sáttmálasett størv.

**Umsóknir:**
Umsóknir við avriti av prógvi, C.V. og møguligum viðmælum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi skjótast gjørligt og í seinasta lagi mánadagin 21. juni 2010

Eru spurningar størvunum viðvíkjandi, eru tit vælkomin at venda tykkum til skúlaleiðaran, Elsu Birgittu P. Petersen, á tlf. 375083 ella 375858

Hvalbiar skúli hevur komandi ár 95 næmingar frá 1. til 9. flokk og við skúlan fara at starvast 12 lærarar

RUNAVÍKAR KOMMUNA

# Sosialráðgevi til Eysturoyar barnaverndartænastu

**Eitt farloyvisstarv, ¾ tíð, sum sosialráðgevi í Eysturoyar barnaverndartænastu er leyst at søkja til setan frá 01.08.2010 til 31.03.2011.**

**Um Eysturoyar barnaverndartænastu**
Eysturoyar barnaverndartænasta fevnir um Nes, Sjóvar og Runavíkar kommunu. Uppgávan hjá barnaverndartænastuni er at tryggja børnum, ið liva undir viðurskiftum ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, neyðuga hjálp og umsorgan.

Umsitingarliga er Eysturoyar barnaverndartænasta eind undir Sosialu deild í Runavíkar kommunu.

**Starvið**
Tú kemur, í tøttum samstarvi við sosialdeildarleiðaran og hin sosialráðgeva á deildini, at taka tær av einum spennandi og fjøltáttaðum øki við málsviðgerð, ráðgeving og øðrum uppgávum sum barnaverndarumsitingin tekur sær av.

**Arbeiðsuppgávan umfatar m.a.:**
- at fyrireika mál til nevndarviðgerð
- at ráðgeva og vegleiða barna- og ungdómsfamiljum við serligum tørvi
- at ráðgeva barnaverndini í barnaforsorgarlógini
- at seta í verk og fylgja upp fyriskipanir
- at virka sum samskipari í málum har fleiri myndugleikar eru við
- at samstarva tvørfakligt
- at arbeiða fyribyrgjandi í samstarvi við fakpersónar og stovnar á barna- og ungdómsøkinum

**Vit leita eftir starvsfelaga, ið:**
- er útbúgvin sosialráðgevi ella hevur aðra viðkomandi miðallanga útbúgving
- hevur royndir sum málsviðgeri ella aðrar viðkomandi royndir
- hevur áhuga og evnir at arbeiða við barna og ungdómsfamiljum við serligum tørvi
- megnar at vera nágreiniligur og samstundis hava nógvar bóltar í luftini
- hevur gott yvirlit og dugir væl at orða seg

**Vit bjóða tær**
Eitt spennandi farloyvisstarvstarv við nógvum avbjóðingum og við góðum møgulleika fyri førleikamenning.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið ella annað viðkomandi fakfelag.

**Fleiri upplýsingar**
Fáast við at venda sær til Jákup H. Foldbo, sosialdeildarleiðara ella Jenny Petersen, sosialráðgeva á telefon 417000.

**Søk starvið**
Við at senda okkum eina umsókn í seinasta lagi 29.06.2010 kl. 12:00

Runavíkar Kommuna
att. Eysturoyar barnaverndartænasta
Heiðavegur 26
Postboks 139
FO-600 Saltangará

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26 · Postrúm 139
FO-610 Saltangará

Lesið Sosialin - so eru tit við